

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 10 - 2011

# Føroyingar við i størsta fundinum í norskari oljusøgu

Ein havnarmaður, ein fuglfirðingur og ein klaksvíkingur kunnu í dag breggja sær av og fegnast um at vera partur av største oljufundinum í norskari oljusøgu uppá góðar tríggjar milliardir tunnur svarandi til eitt virði uppá 1-2 billiónir krónur. Sætt ovfarakæti sermerkir norskar miðlar í dag, nú Statoil hevur kunngjørt stórtíðindi. Risastóra oljufundið Avaldsnes/Aldous, sum varð gjørt í norskum øki herfyri, kann gerast største oljukeldan í Noregi nakrantíð. Í byrjan varð mett, at fundið var 1 til 2 milliardir tunnur. Nú sigur Statoil, at fundið helst er millum 1,7 og 3,3 milliardir tunnur. Komandi metingarbrunnar kunnu vísa, at hon er enn størri. Størstu fundini í norsku oljusøguni higartil eru Ekofisk og Statfjord uppá ávikavist 3,6 og 3,4 milliard tunnur. So stórt er umrødda fund og so stóran týdning hevur tað fyri feløgini, sum eru við og fyri norska statin, at við dagsins oljuprísi uppá umleið 109 dollarar hevur Avaldsnes/Aldous fundið eitt virði uppá 1000 og 2024 milliardir krónur ella 1-2 billiónir krónur. Orsøkin til at fundið er so nógv vert er eisini tann sannroynd, at talan er um gott slag av olju, og er fundið á grunnum vatni, hvat ger útbyggingarkostnaðin munnandi minni. Feløgini, sum eru við í fundinum, eru Statoil, Petoro, Maersk, Lundin Petroleum og Det Norske Oljeselskab. Statoil er fyristøðufelag fyri einum parti av fundinum, meðan Lundin er fyristøðufelag fyri enn einum parti. Fyri føroyingar, sum hava áhuga í oljuvinnuni, eigur hetta fund eisini at hava áhuga. Tí í trimum av feløgunum, sum eru við í fundinum, eru tríggir føroyingar í leiðandi størvum. Rúni M. Hansen úr Fuglafirði er leitistjóri hjá Statoil í Norðureuropa og Norðurafrika, Teitur Poulsen úr Havn er fíggjarstjóri í Det Norske Oljeselskab, og Tummas Pauli Mýri úr Klaksvík hevur leiðandi starv á vinnumenningardeildini hjá svenska oljufelagnum Lundin. Mynd - Teir tríggir føroysku oljumenninir, sum eru partur av største oljufundinum nakrantíð er gjørt í Noregi og tí største